Edmund Joensen:

# – Ikki væntað so hvassa framseting

*Páll Holm Johannesen*

Løgtingsformaðurin, Edmund Joensen, var saman við Jóannesi Ejdesgaard annar av andstøðuleiðarunum, tá landsstýrið í 2000 samráddust við danir. Edmund heldur, at filmurin var góður, og at hann lýsir væl fólkið, og hvussu vandamikið tað er at lata politikkarar spæla við framtíðini hjá einum fólki.

Hann metir, at filmurin lýsir danir at vera hástórar yvirfyri føroyingum, og filmurin als ikki tekur nóg stóra hædd fyri ,at í Føroyum er ein stórur partur av fólkinum, ið ikki ynskir seg úr ríkisfelagskapinum.

Edmund er eisini av teirri áskoðan, at filmurin er kliptur soleiðis, at mótsetningar millum føroyingar og danir eru alt ov hvassir settir upp, hóast veruliga myndin sær øðrvísi út.

Spurdur um hann væntar, at nakað kjak fer at standa av filminum, svarar løgtingsmaðurin, at hann verður ikki tikin av bóli, um so verður.

– Vit sum hava verið í politikki í langa tíð, vita, at tað sum kann brúkast politiskt verður eisini nýtt, men spurningurin er bara um filmurin kann nýtast til nakað, tí filmurin fór fram í einari aðrari tíð, og politiska støðan er ein onnur í dag, sigur Edmund Joensen at enda.



*Løgtingsformaðurin, Edmund Joensen, heldur at føroyar.dk ikki gevur eina rættvísa mynd av viðurskiftunum millum føroyingar og danir. Mótsetningar eru settir ov hvast upp, heldur Edmund Joensen*

*Mynd: Jens Kristian Vang*



Helena Dam á Neystabø sannførd:

# – Samráðingarnar skuldu verið í Føroyum

*Páll Holm Johannesen*



*Fyrrverandi forkvinnan í Sjálvstýrisflokkinum, Helena Dam á Neystabø, helt samanumtikið, at filmurin var góður, men filmurin kann ikki standa einsamallur sum dokumentation fyri sjálvstýristilgongdina*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Helena Dam á Neystabø var sum heild nøgd við, hvussu hennara leiklutur undir samráðingunum við danir varð lýstur í filminum. Hon heldur tó, at størri áherðsla kundi verði løgd á hennara arbeiði, sum fyrst og fremst var tryggja tí breiðu semjuna í Føroyum. Hon leggur í tí viðfangi afturat, at júst tað økið ikki er av størsta pr. áhuga, meðan størri dentur verður lagdur á tey meira radikalu evnini.

– Eg haldi annars, at filmurin gevur eitt reelt bílæt av, hvat fór fram undir samráðingunum, men eg vænti, at tey, sum eru uttanfyristandandi kunnu hava torført við at finna ein reyðan tráð, tí samráðingarnar vóru so fragmentariskar, og tað vísir filmurin eisini, sigur Helena Dam á Neystabø.

Hon var undir øllum fýra samráðingarumførunum ein av føroysku samráðingarleiðarunum, men seinastu tvey árini hevur Helena Dam á Neystabø ikki luttikið í politikki. Spurd, um filmurin fekk nakrar kenslur fram í henni, nú hon ikki longur er í politikki, svarar Helena, at tað er dupult.

– Eg haldi filmurin lýsir væl, hvussu nógva tíð ein kann nýta til at koma so stutt, men hinvegin so kemur eisini fram, at politikkur bæði kann verða eggjandi og dragandi, so mín kensla er eitt sindur ambivalent, greiðir hon frá.

### Samráðingar skuldu verið í Føroyum

Eftir, at sæð samráðingarnar á filmi, er Helena Dam á Neystabø alt meira sannførd um, at føroyingar aldrin skuldu verið farnir til Danmarkar at samráðast.

– Við at vit fóru niður, var rolludeilingin fastløgd, og vit blivu alt fyri eitt the underdog, og tað kemur eisini týðuliga fram í filminum í kvøld, heldur fyrrverandi forkvinnan í Sjálvstýrisflokkinum.

Hon sigur, at møguliga fer filmurin aftur at elva til kjak um fullveldi, men hon væntar, at møguliga kann filmurin vera við til at taka týdningarmiklar spurningar um fullveldi framaftur, sum eru farnir aftur bakgrundina, eftir at samráðingarnar slitnaðu.

– Samanumtikið haldi eg, at tað er ein góður filmur um eitt at teimum týdningarmiklastu skeiðum í nýggjari føroyskari politiskari søgu. Filmurin viðger umráðandi spurningar, og tað er gott, at hann er gjørdur, men filmurin kann ikki standa einsamallur sum dokumentatión fyri sjálvstýristilgongdina, sigur Helena Dam á Neystabø at enda.



*Anfinn Kallsberg bannar í filminum Føroyar.dk. Tað er hann ógvuliga harmur um*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Anfinn Kallsberg:

# Harmur um ljótu orðini

*Rúnar Reistrup*

Anfinn Kallsberg, løgmaður, var rættiliga harmur eftir at hava sæð filmin. Ikki so nógv av at hava sæð torføru samráðingarnar aftur. Men av tí at hann í filminum sigur nøkur orð, sum hann ongantíð fyrr hevur sagt fyrr í almennum høpi. Ja, hann snøgt sagt bannaði.

– Sakin er tann, at eftirhondini gjørdist Ulla ein so fastur partur av gerandisdegnum, at man gloymdi, at hon var har. Og so segði man onkuntíð okkurt, sum man ikki átti at sagt. Nú vildi eg ynskt at eg hevði vandað mær eitt sindur betur um orðini, tá Ulla var til staðar, sigur løgmaður.

Anfinn Kallsberg er tó ikki einsamallur um at lata ljót orð fella í filminum. Bæði Høgni Hoydal og onnur lata onkra eið gleppa.

Spurdur um hann var nøgdur við tann hátt, sum hansara egni leiklutur varð lýstur í filminum, sigur Anfinn Kallsberg, at tað er natúrligt, at Høgni Hoydal er meira í fokus enn hann sjálvur.

– Býtið var nú einaferð soleiðis, at Høgni sum táverandi landsstýrismaður við sjálvstýrismálum hevði ábyrgdina fyri allari fyrireikingini av samráðingunum, meðan eg førdi sjálvar samráðingarnar.

Spurdur um hvørja mynd filmurin gevur av samráðingunum, sigur løgmaður, at eftir hansara tykki hevur Ulla Boje Rasmussen megnað at lýst samráðingarnar væl útfrá tí rásarúmi, hon fekk, og sipar her til at filmskvinnan bert slapp við til útvaldar fundir og als ikki slapp við til sjálvar samráðingarnar.

Sjúrður Skaale, embætismaður undir samráðingunum:

# – Ikki rættvís mynd av triðja samráðingarumfari

*Páll Holm Johannesen*



*Skemtarin og blaðmaðurin, Sjúrður Skaale, dámdi væl filmin hjá Ullu Boye, men kortini hevði hann onkur hjartasuff*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Skemtarin og blaðmaðurin, Sjúrður Skaale, arbeiddi í 2000 sum embætismaðurin hjá Høgna Hoydal, ið var landsstýrismaður í sjálvstýrismálum. Sjúrður Skaale var við undir øllum fýra samráðingunum við danir í 2000. Spurdur um filmurin Føroyar.dk gevur eina veruliga mynd av, hvat fór fram undir samráðingunum við dønum, svarar Sjúrður, at filmurin er reellur, men kortini er hann ikki heilt nøgdur við framsetingina hjá Ullu Boje av triðja samráðingarumfari.

– Í filminum kemur fram, at vit í triðja samráðingarumfari, fóru eina og aleina við uppskoti um at pantseta oljuna, men tað var bert fyri at fáa glið á samráðingar, og tí er myndin av triðja samráðingar umfari ikki heilt rættvís, sigur Sjúrður Skaale.

Hann er annars væl nøgdur við filmin, og serliga vóru innsløgini við Elisi Poulsen og journalistunum væl eydnað og stuttlig. Hann vísir á, tað er torført at gera ein film um júst hetta evni, tí alt var so gruggað og kaotiskt undir samráðingunum, men at Ulla Boye megnar væl at halda fast í tí centrala. Sjúrður letur eisini væl at, hvussu arbeiðið hjá føroysku embætismonnunum verður lýst.

### Samráðingar brotið skuldi verið greiðari

Sjúrður hevur tó eitt lítið hjartasuff til Føroyar.dk. Hann heldur, at orsøkin til, at allar samráðingar at enda slitnaðu, kundi komið týðuligari fram í filminum.

– At danir ikki vildu góðtaka okkum sum eitt fólkaretsligt subjekt, og harvið skerja okkara rættindi til at kalla okkum eina tjóð, skuldi verðið greiðari lýst. Tá teir sýttu fyri tí, sýttu teir okkum at samráðast sum javnbjóðis partar, og tað kundi komið týðuligari fram, greiðir Sjúrður Skaale frá.

Høgni Hoydal:

# Vaknar enn um næturnar

*Rúnar Reistrup*

Fyri Høgna Hoydal var tað ein harður umgangur kensluliga at síggja hendingarnar kring sjálvstýrissamráðingarnar á hvíta løriftinum. Men filmurin styrkti hann eisini í nøkrum av teimum niðurstøðum, sum hann sjálvur hevur gjørt sær um gongdina.

– Filmurin gjørdi meg enn meira greiðan yvir tað, sum eg havi hugsað síðan samráðingarnar, at vit skuldu ikki verið farin niður at samráðast uttan at hava eina fólkaatkvøðu í rygginum. Vit manglaðu eitt konkret mandat, og tí endaðu vit ofta í krosseldi millum føroysku andstøðuna og donsku stjórnina.

Sambært Høgna Hoydal var tað torførasta við filminum at síggja føroysku ósemjuna, serstakliga tá fólkaatkvøðan um loysing varð tikin aftur av løgmanni.

Spurdur um tað var rætt ikki at slíta samgonguna tá, sigur Høgni Hoydal beint eftir at hava sæð filmin:

– Tað veit eg ikki um tað var. Tað vakni eg satt at siga framvegis upp um næturnar og hugsi um. Niðurstøðan um hvørt tað var rætt ella ikki, skiftir enn eitt sindur.



*– Vit skuldu ikki verið farin niður at samráðast uttan at hava eina fólkaatkvøðu í rygginum, segði Høgni Hoydal eftir at hava sæð filmin*

*Mynd: Jens Kristian Vang*